# Álit

# í

## løgtingsmáli nr. 11/2023: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 19. september 2023, og eftir 1. viðgerð 21. september 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 26. oktober 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við sjálvsognarstovnin Føroya Arena, Tórshavnar kommunu og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Lógaruppskotið snýr seg um at geva landsstýriskvinnuni heimild at lata 30 mió. kr. í stuðli til at byggja stórhøll í Hoyvík.

Upprunin til málið er, at allir floksformenn á Løgtingi tann 18. mars 2022 undirskrivaðu eina fráboðan, har teir boðaðu frá, vegna politisku flokkarnar á Løgtingi, at teir vildu veita stuðul til verkætlanina Føroya Arena. Í fráboðanini varð sagt, at tikið varð undir við, at játtaðar verða í alt 30 mió. kr. fyri fíggjarárini 2022, 2023, 2024 og 2025, harav 5 mió. kr. longu vórðu játtaðar á fíggjarlógini fyri 2022.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið upplýst, at tilsøgnin snýr seg um stuðul til bygging, og at játtan til rakstur ikki er partur av málinum.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 2. november 2023**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðgunn Samuelsen<br>formaður | Beinir Johannesen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Eirikur í Jákupsstovu | Hanna Jensen | Magnus Rasmussen |
| | Steffan Klein Poulsen | |